FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

23. februar 2024
Mál: 24/03721-3
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-087/2023

**Svar til fyrispurning nr. 52-087/2023 frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, til Dennis Holm, landsstýrismann, um kanningar av ungfiski og yngli inni við land**

**Spurningar:**

1. Hvørjar kanningar ger mann í Føroyum av ungfiski og yngli inni við land?
2. Er nakað samstarv millum Havstovuna og Firum viðvíkjandi kanningum av vistskipanini, harímillum kanningar av yngli og ungfiski inni við land?
3. Um ikki, eru so nakrar ætlanir um at byrja eitt skipað samstarv fyri at økja um samlaðu vitanina um okkara vistskipan?

**Svar:**

**Til nr. 1.**



<u>Regluligar kanningar á Havstovuni:</u>

Yngul- og ætikanningar verða gjørdar á hvørjum ári í juni; hesar kanningar byrjaðu longu við Jens Chr. Svabo í 1970unum. Endamálið við hesum kanningum er at fáa eitt mát fyri árgangsstyrki hjá ávísum botnfiskasløgum, serliga toski, so tíðliga sum gjørligt. Samstundis verða pelagiska vistfrøðin, æti, gróður og føðsluevni kannað.

Ein PhD-verkætlan við støði í yngulkanningunum verður liðug seinni í ár. Kanningarøkið er Landgrunnurin og Føroyabanki (sí kort høgrumegin), men farið verður vanliga ikki inn á firðirnar. Í 2022 og 2023 vóru tó 3 støðir heilt inni við land, sum partur av eini verkætlan (FjordProcess), sum kannar útskifting av sjógvi, streymar, gróður, æti og smáan fisk uppi í vatnsúlini úr Kaldbaksbotni út millum Stong og Eystnes.

Havstovan hevur ikki enn havt umstøður at gera regluligar ungfiskakanningar inni við land. Slíkar kanningar høvdu verið serliga relevantar fyri tey fiskasløg, t.d. tosk og upsa, sum brúka firðirnar sum uppvakstrarøki. Nevnast kann, at danskir granskarar gjørdu ungfiskakanningar í føroyskum firðum fyrru helvt í 20. øld; hesar kanningar fevndu um t.d. merkingar, magakanningar og vakstrarkanningar.

Regluligar kanningar (vár og vetur) av brislingi hava verið gjørdar í Tangafirði, Sundalagnum og Skálafirði síðani 2018 við tí endamáli at kanna útbreiðslu, nøgd og lívfrøði hjá brislingi. Í hesum kanningum hava vit umframt brisling eisini sæð lodnuyngul nøkur av árunum.

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Verkætlanir í gongd:

Í løtuni eru tvær verkætlanir, sum Fiskivinnugransking hevur fíggjað, í endafasu – prøvatøkan er liðug, men úrslit eru ikki liðugt greinað enn.
Onnur er ein undanverkætlan (’Taraskógir sum uppvakstrarøki’) við gørnum (granskingargørn við ymsum meskastøddum), umhvørvis-DNA (eDNA) og videokanningum av tarasamfelagnum á Kaldbaksfirði.

Hin kanningin er partur av eini júst lidnari verkætlan (’Nebbasild og toskur á innaru leiðum’), har ungfiskur regluliga sást á video-upptøkum; hesi data eru tó ikki liðugt greinað. Verkætlanin kom til ta niðurstøðu, at video-upptøkur av hesum slag við tíðini helst fara at egna seg væl til ungfiskakanningar inni við land.

Eldri verkætlanir:

Aðrar eldri verkætlanir fevna um merkiroyndir – onkrar eru uppgjørdar, aðrar ikki uppgjørdar – og í nøkur ár var samstarv, har hjáveiða av ungum toski í hummararúsum var skrásett.

**Til nr. 2**
Havstovan og Firum samstarva í løtuni um m.a. verkætlanina FjordProcess og Taraskógir sum uppvakstrarøki. FjordProcess nertir við yngul, og Taraskógir sum uppvakstrarøki nerta við ungfisk heilt inni við land. Báðar kanna harafturat vistskipanina á hvør sín hátt.

**Til nr. 3**
Skipað samstarv er millum Firum og Havstovuna um hesar báðar verkætlanir, sum eru í gongd. Harafturat er annað samstarv, sum ikki er eins formelt, har starvsfólk á báðum stovnum hava gagn av servitanini hjá hvør øðrum. Royndirnar av samstarvi millum stovnarnar er gott, og samskipaða samstarvið kann verða útbygt tá/um umstøður eru til tess.

Vistskipanin inni við land er sum heild alt ov lítið kannað og er at rokna sum eitt satsingarøki í framtíðini – ikki minst, nú so nógv aling og annað mannaelvt virksemi er á firðunum. Slíkar kanningar høvdu upplagt kunnað verið skipaðar sum samstarv millum Firum og Havstovuna – og møguliga aðrar stovnar við.

**Dennis Holm**
landsstýrismaður